ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.



# HÚS Í KLAKSVÍK

Sethúsaognin matr. nr. 55 og 56, Klaksvík, Stoksoyrarvegur 65, verður seld, um hóskandi boð fæst.

Grundøkini eru til støddar 251 m2 tilsamans. Eldri parturin av húsunum er bygdur uml. 1940 og nýggjari parturin uml. 1950. Í 1987 vórðu húsini umvæld. Tey vórðu bjálvað, klødd við timbri, tak og vindeygu skift. Húsini kunnu nýtast sum tvær sjálvstøðugar íbúðir, ella sum ein eind.

Húsini eru innrættað soleiðis:

**Eldri parturin:**
Miðhædd: Gangur, stova og køkur.
Á loftinum: Lítið kamar, størri kamar, kvistur, baðirúm og úti á lofti.

**Nýggjari parturin:**
Miðhædd: Gangur, køkur og stova.
Loft: 3 kømur og baðiverilsi.

Úthús við kjallara og hjalli standa á stykkinum.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til Fríðu Patursson, advokat, telefon 353335 ella t-post frp@jura.fo og skrivaran Maibritt Johannessen t-post maj@jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

# Kunngerð

Samb. kunngerð nr. 109 frá 7. desember 2007 fer løgtingsval fram
**leygardagin tann 19. januar 2008 á kommunuskrivstovuni í Leirvík.**

Atkvøðugreiðslan byrjar
**kl. 10.00 fyrrapartin og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi, veljarar møta uttan steðg.**

**Brævatkvøður**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið, tann 18. januar 2008, greiða brævatkvøðu við at venda sær til fólkayvirlitið/kommunuskrivstovuna. Brævatkvøður skulu vera valstýrinum í hendi **innan** valið byrjar kl. 10.00 tann 19. januar 2008.

**Heimaval**
Veljarar, ið vegna sjúku ella annað ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima frá 12. januar 2008 til og við 18. januar 2008 við at boða frá til kommunuskrivstovuna – helst innan kl. 15.00 fríggjadagin tann 18. januar 2008.

**Valkort**
Valkort verða send øllum, ið sambært vallistan hava valrætt í Leirvíkar Kommunu og **skulu** nýtast til valavgreiðsluna. Veljari, sum ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt, men annars til og við valdagin.

*Leirvík, tann 07. januar 2008*

**Valstýrið í Leirvíkar Kommunu**

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42 · 520 Leirvik

# Íslendskur lestrarstuðul

Íslendska Mentamálaráðuneytið bjóðar føroyingum at søkja stuðul (78.300 ísl.kr. um mánaðin í 8 mánaðir) til lestur í íslendskum máli og bókmentum á hugvísindadeild Háskóla Íslands lestrarárið 2008/2009. Stuðul kann eisini latast til nám í altjóða námi í íslendskum miðaldarbókmentum á M.A.-stigi.

Upphæddin røkkur til vistarhald. Studentunum verður útvegað innivist á studentagarði, og húsaleigan verður goldin av studninginum.

Námið byrjar 1. september 2008 og endar 30. apríl 2009.

Umsóknir skulu vera Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 6. mars 2008. Umsóknarblað og kunning fæst á **www.hi.is** ella við at venda sær til Setursskrivstovuna.

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
J.C. Svabos gøtu 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
tlf. 352500, fax 352501

SENDISTOVAN

# Kunngerð

**um framløgu av broytingaruppskoti í býarskipanini og byggisamtyktini fyri Leirvíkar Kommunu.**

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinri broytingum hevur kommunustýrið á fundi tann 17. desembur 2007 samtykt at gera broyting í býarskipanini og byggisamtyktini fyri Leirvíkar Kommunu.

Broytingin er løgd fram til almenna eftirskoðan í vanligu upplatingartíðum frá 14. januar til 14. februar 2008.

Broytingin fevnir um økið við Bólagerði, ið er lagt út til bústaðarøki B, sum verður broytt til ídnaðarøki C.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 17. apríl 2008.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42 · 520 Leirvik

TVØROYRAR KOMMUNA

# Løgtingsvalið

19. Januar 2008

Til veljarnir í Tvøroyar kommunu.

Valið fer fram í skúlahøllini í Trongisvági frá kl. 10.00-20.00

Valkort verða send veljarunum

Seinasta freist at greiða brævatkvøðu til Løgtingsvalið er fríggjadagin 18. januar. Kl.16.00.

Tey, ið ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 371085 innan kl.12.00 fríggjadagin 18. jan.

Bussur koyrir til valstaðið hvønn heilan tíma úr miðbýnum, runt Froðba og til Øravíkar.

Um onkur ynskir bil á valstaðið, kann ringjast til ein av hýruvognunum.

Minnist til at hava valkortið við.

**Tvøroyrar Kommuna**



# LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo